# í verðina við SIC





*Frá konsertini í Ålborg*




*Sicari í upptøkuhøli í Århus*



*Karl Anton Klein, sum hevur gjørt eitt megnar arbeiði til fram fyri ungu tónleikararnum í høvuðsstaðnum hevur verið við til at fyriskipa bæði konsertferð og upptøkur í Danmark*



*Frá upptøkunum í Århus*

menniskjakroppurin ikki klárað at liva við.

## Ein ordans promo pakki

Meiningin við upptøkunum er í Århus er at hava møguleikan at geva nakað til spælistøð og plátuløg uttanlands. Og tað at vera nøgdur við produktið, sum verður latið fremmandum fólki. At tað ikki bara er ein vanlig keðilig upptøka, sum verður tveitt aftur í høvdið. Ein promo pakki, sum vekir fólk. Ein promo pakki, sum inspirerar fólk. Og ein promo pakki, sum var tað vert.

## Promo arbeiði í Føroyum

Í Føroyum verður nógv promo arbeiði gjørt. Sum mest heimagjørt. Tað burdi verið ein bíligur máti at hjálpt ungum og eldri tónleikarum uppá. Har man t.d. hevði eitt hampuligani gott studio undir eygunum av fólki við forstandi. Og her skuldu bólkar komið og fingið gjørt bíligt og gott promo arbeiði.

## Kr. 169,-

Tá ið fløgan hjá SIC einaferð kemur á hillarnar í 3'aranum í SMS, kann eg forsiktiga siga, at eg hevði 100% givið tær 169,- føroysku krónurnar fyri eina fløgu frá 3'aranum í SMS....... men annars.. nei.

(Stuðlað tiltakinum hava Mentunargrunnurin og Mentamálarráðið, Barnabati og Poul Michelsen.)